# Hús á Tvøroyri til sølu

**Fæst nóg gott boð, eru eini hús í veðurgóðum umhvørvi á Tvørabakka til sølu.**

**Tey eru í tveimum hæddum, bygd í 1966 og eru umleið 110 fermetrar stór.**

**Tel 37 13 13 ella 21 37 13**


# Tak

Af hjertet tak til alle, som den 29. april 2005 aflagde mig et besøg på min sidste arbejdsdag i FØROYA BANKA.

Jeg kom i januar 1993 til Færøerne med en knude i maven. Nu rejser jeg igen - med en klump i halsen.

Nogen bevægelse har der da været.

Tak for turen.

***Jørn Astrup Hansen***


T Ó R S H A V N A R K O M M U N A



## Diplomútbúgving sum demenssamskipari

Enn eru nøkur fá pláss eftir til skeiðið í »Diplomútbúgving sum demenssamskipari«.

Áhugað kunnu tekna seg við at venda sær til Snarskivuna, tlf. 302010. Eru spurningar, kann ringjast til Heimvitjanartænastuna á tlf. 302063 millum kl. 8.00-9.00 gerandisdagar, ella senda teldupost til jonvor@torshavn.fo, har tað eisini er møguligt at melda luttøku.

Seinasta freist at melda luttøku er fríggjadagin 13. mai 2005.

www.torshavn.fo


## Tvingsilssøla

**Fríggjadagin 17. juni 2005, kl. 13.30** verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir ognina **matr. nr. 168G, Vágur,** ið er virkisbygningur á leigugrund (AS 2-14/2005).

Fyrireikandi fundur verður **fríggjadagin tann 3. juni 2005, kl. 13.00.**

Talan er um virkisbygning, samanbygdur av tveimum bygningum, tilhoyrandi Sp/f Fargo í konkurs. Virkisbygningurin hevur verið brúktur til saltfiskaframleiðslu.

Samanbygdu bygningarnir eru nærri innrættaðir soleiðis:
Annar er í tveimum hæddum, harav niðara hæddin er stoypt og ovara hæddin klødd við timbri. Á ovaru hæddini eru 3 baðirúm, 2 skiftingarrúm, eitt óinnrættað goymslurúm, kantina, skrivstova og gongd. Á niðaru hæddini er eitt køli/búningarrúm.
Hin er ein framleiðsluog turkihøll gjørd úr stáli, klødd við aluminium, og er fundamenti úr betong.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Inga Højgaard, advokati, Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tel. 311260, (sak nr. 520502),** sum kann geva upplýsingar um ognina og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur**
hin 29. apríl 2005

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 3101,** Sp/f VR-Bilar, 100 Tórshavn.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Sverri Steintún, Fjalsgøta 7, 100 Tórshavn
**Innkomin sum stjóri:** Marni Olsen, Dalatún 13, 100 Tórshavn

Skráseting Føroya
tann 03. mai 2005

Kristin Balle

## Fráboðan um loyvi til aftursøkking

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan hin 29. apríl 2005, við heimild í kunngerð nr. 38 frá 8. mars 2001, um aftursøkking av tilfari, sum er tikið upp av havbotninum, hevur givið Tórshavnar havn loyvi til aftursøkking av tilfari, sum ætlanin er at taka upp av botni í sambandi við havnagerð á Oyrareingjum.

**Tilfarið kann aftursøkkjast á Tangafirði, á umleið 62° 07,0' N og 06° 51,2' W**

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til landsstýrismannin í umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2. hædd, FO-100 Tórshavn. Kærufreistin er úti fríggjadagin hin 27. mai 2005.

Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**


# Koyri-kort?

Teoriskeið til motorsúkklu **mánadagin 09.05**

FØRARASETRIÐ
K O Y R I S K Ú L I

**Stanley A. Olsen**
koyrilærari
**tel 21 10 99**

**John A. Christiansen**
koyrilærari
**tel 21 47 75**

**Jekaragøta 10 • Tórshavn**



T Ó R S H A V N A R K O M M U N A




Øll søla og tiltøk, sum skulu vera á ólavsøku ella lýsast í ólavsøkuskránni í ár, skulu nýta serligt umsóknarblað. Umsóknarblaðið fæst í Snarskivuni og á heimasíðu kommununar.

Freistin at flýggja inn umsóknarblaðið er sett til týsdagin 21. juni 2005 kl. 12.00.

Umsóknir, sum koma inn aftan á 21. juni 2005 kl. 12.00, verða ikki viðgjørdar.

**www.torshavn.fo**





Bygningur í J.H.Shrøtersgøtu 11 til leigu ella sølu

Bygningurin er bygdur í 1982
Er uml. 420 m² í tveimum hæddum
Grundøkið er 990 m²
Niðara hæddin er innrættað við einari íbúð
Hevur verið nýttur til rættarhølir og skrivstovur
Sera gott útsýni yvir havnarlagið
Parkeringspláss til 8 bilar

Um áhugi er fyri leigu ella keyp kann ringjast til tlf. 312930 ella 313522



## Søkt verður eftir tænara/servitrisu

til hugnaligu matstovu okkara at byrja skjótast gjørligt

Vinaliga ring 213430 ella 313430
Marco Polo



Sosialurin
www.sosialurin.fo